FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Leiðslufundur 6. desember 2016**

| Heiti: | Leiðslufundur |
|---|---|
| Til staðar : | Sigurð í Jákupsstovu, Hans Pauli Joensen, Hans Andrias Sølvará, Jørgen Meitilberg, Janus Jensen og Turið Sigurðardóttir |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 6. desember 2016 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

**Mál til umrøðu:**

1. **Eftirmetingartilgongd – bygnaður – kunning frá stýrisfundinum**

Rektarin kunnaði um tilmælið um bygnað, sum varð lagt fram á stýrisfundi 22. november. Stýrið hevur samtykt, at dekanar verða settir fyri hvørja deild, tvs. at tað verða fimm dekanar. Dekanarnir arbeiða sum leiðarar á síni deild umframt at teir arbeiða við gransking, útbúgving og fyrisiting. Dekanar á somu megindeild hava felags ábyrgd av menning av megindeildini, og eru javnsettir í leiðsluni og vísa til rektaran.

2. **Setanarnevnd og metingarnevnd ---- mannagongdir í samband við vísindaligar setanir**

Hvussu skal reglugerðin fyri størv á Fróðskaparsetri Føroya tulkast, tá tað umræður vísindaligar setanir. Dekanur kann sjálvur vera limur í setanarnevndum, men tað er ymiskt, hvussu hetta verður praktiserað.

Dekanurin hevur ábyrgd av setarnartilgongdini, men tað er rektarin sum góðkennir metingarnevndir og setanarnevndir. Orsøkin til at rektarin góðkennir metingarnevndir og setanarnevndir er fyri at tryggja armslongdarprinsippið.

Reglugerðin eigur at verða endurskoðað, soleiðis at leikluturin hjá dekaninum verður eitt sindur greiðari.

3. **Samsýningar fyri**

Tað vísir seg, at próvtøkusamsýningar á deildunum eru ymiskar. Fyrisitingin eigur at endurskoða reglurnar fyri samsýning.

/JM